# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EINKI TAMARHALD

Vit hava á hesum stað fleiri ferðir nevnt føroyskan politikk glantrileik, og hetta liva tingfólk og landsstýrisfólk væl upp til hvønn einasta dag – og tað gjørdu tey eisini í dag. Tað er púra einki skil í landsins leiðslu, vit hava onga samgongu – og óvist er um vit hava nakra andstøðu heldur.

Nú bíða vit bara eftir løgmanni, og hvussu leingi hann heldur, vit hava eina samgongu. Løgmaður hevur sera stórt vald, tá viðurskiftini gerast so kaotisk. Hann kann koyra løgtingið til hús, hann kann koyra landsstýrisfólk til hús, hann kann útskriva nýval – og hann er framvegis løgmaður, tá nýggja løgtingið tekur við – og hevur tá sera stóra ávirkan á, hvør skal gerast næsti løgmaður.

Spurningurin er, hvør tað er, sum stýrir politikkinum. Vit kunnu staðfesta, at tað ikki eru floksformenn og politiskir flokkar. Vit kunnu av góðum grundum seta spurnartekin við, um vit í heila tikið hava nakrar flokkar, tí soleiðis sum tingfólk arbeiða, so er tað hin einstaki, ið ger sum honum lystir.

Tosað hevur verið um semjuna millum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin. Dagurin í gjár vísti, at tingfólkini hjá Sambandsflokkinum als ikki taka undir við formanninum, sum kortini einki veit um tað. Ikki ein gong Javnaðarflokkurin, sum eigur fíggjarmálaráðharran við karmunum, stendur saman. At Gerhard ikki tekur undir við karmunum, tí eingin Sandoyartunnil er í honum, sigur nógv um, hvussu vitleyst politiska arbeiðið er, og hvussu lítið samanhang er millum orð og gerðir, og hvussu illa tað ber til at savna ein so lítlan tingbólk, sum tann hjá Javnaðarflokkinum.

Spurningurin er, um flokkarnir í veruleikanum fyrireika seg til løgtingsval. Í síðstu viku sóu vit ein annan glantrileik hjá Tjóðveldinum um eitt misálitisuppskot, sum í roynd og veru bara var dreingjalótir. Tjóðveldihevði ikki ein gong hevði tryggjað sær, at øll tingfólkini - enntá løgtingsformaðurin – møttu til



arbeiðis. Kanska ein roynd at fáa Fólkaflokkin at viðganga okkurt. Men seriøsur politikkur er tað ikki. Og gott politiskt handverk er tað heldur ikki.

So er spurningurin, um orsøkin til glantrileikin er óttin fyri at taka neyðugu avgerðirnar – ella um frustratiónirnar standast av viljanum at halda seg til maktina. Løgmaður og fíggjarmálaráðharrin hava málað seg inn í ein krók, hagani eingin gongd leið er eyðsýnd.

**Fær Gerhard ikki tunnilin, atkvøður hann ímóti...**

# Blaðhús stórar vónir til iPad

Tann nýggja lítla teldan, iPad, hevur birt vón hjá fleiri trongdum blaðhúsum. Handan hav hevur áhugin fyri nýggju telduni verið sera stórur - og heldur gongdin fram, so verður roknað við, at tey verða nógv, ið vilja framleiða tilfar til iPad'in - eitt nú bløðini. – Tað tilfarið, sum bløðini frammanun geva burtur fyri einki á internetinum, verður sagt.



– Eg haldi, at iPad verður gjøgnumbrotið, sum ger, at talgilt tilfar fer at kosta pengar, segði Lisbeth Knudsen, samtaksstjóri hjá Berlinske Medier, við TV-avísina í gjárkvøldið.

Berlinske Medier hevur longu fleiri forrit klár til iPad'in.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Onnur løgdu meira fyri

Hóast Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, ikki kundi møta á tingfundinum skírisaftan at fella løgmann – og hóast flokkurin hjá honum ikki gjørdi meira fyri at tryggja sær sínar egnu atkvøður til tess at tað skuldi eydnast at fella løgmann, so løgdu samgonguflokkarnir meira fyri til tess at loysa teirra trupulleika við tingfólkum, sum ikki møttu til arbeiðis.

Jaspur Vang, sambandstingmaður úr Suðuroy, kom við tyrlu til Havnar.

Fýra fólk hjá Javnaðarflokkinum, sum vóru uttanlands, kláraðu umvegis teldupost og sms at biðja tingið um farloyvi, so næsta fólk á listanum kundi møta.

Javnaðarflokkurin, sum bara hevur seks tingfólk, kallaði nr. 12 og nr. 13 á listanum inn at bjarga samgonguni undan misálitisuppskotinum.

Um Høgni Hoydal hevði klárað at lokkað nakrar fólkafloksmenn at atkvøða fyri, so hevði uppskotið kortini fallið, tí hann ikki fekk allar uppskotsstillararnar til arbeiðis.

*eirikur@sosialurin.fo*



**Fólkaflokkurin má melda greitt út**

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK SÍÐA 13



**Vanlig fatan er, at eitt val loysir onki**

KÁRI Á RÓGVI
KJAK SÍÐA 18

# Hergeir visti einki

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, hevur hesa viðmerking til oddagreinina í Sosialinum 8. apríl 2010:

»Tingfundurin 31. mars hevði bert framløgu av játtanarskipanini á skránni.

Ein tílíkur framløgufundur tekur vanliga tveir minuttir og kann eftir tingskipanini avgreiðast av formanninum einsamøllum.

Tá ein havnarferð hevði tikið 14 tímar, varð avtalað við næstformannin at avgreiða fundin.

Eitt misálit, sum eg einki kendi til, varð framlagt, og gjørdi hetta fundin mundandi drúgvari.

Sjógvegis sambandið forðaði mær í at koma vegin fram til hesa viðgerð.«

**Hergeir Nielsen**




# Súkkla í húnar hátt

Um tað er Egesippusi, sum tryggingarfelagið Trygd flaggaði fyri í mikudagin, er ikki greitt. Men í øllum førum eitur tann dagurin, 7. apríl, Egesippus – eftir einum jøda í Róm, sum gjørdist kristin einferð seint í triðju øld.

Tá fólk kom til arbeiðis hjá Trygd í Havn mikumorgunin sóu tey, at ein súkkla varð vundin í húnarhátt á flaggstongini sum stendur við høvuðsdyrnar hjá tryggingarfelagnum undir Kjallara.

*eirikur@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*